Stefan Zweig, sum hann týddi til útvarpið og sum eisini er útgivin.

Á ungum árum las Axel yrkingina sum N. F. S. Grundtvig hevði skrivað um páskaliljuna og Jesu uppreisn. Hann var hugtikin av henni og týddi hana til føroyskt. Í 1990 kom hon út við føgrum myndum, sum Zacharias Heinesen teknaði til hesa útgávu.

Eins og Grundtvig hevur Petter Dass havt nógvan týdning fyri føroyingar, og er hann eisini umboðaður í okkara sálmabók. Axel kendi mætu yrking hansara Nordens Trompet frá skyldfólkum sínum í Nólsoy, og fór hann undir at týða hana og kom hon út í 1999.

### Týðingar úr forngrikskum

At týða úr donskum, norskum, enskum og týskum eru tað so nógvir aðrir føroyingar sum hava gjørt, men teir kunnu teljast á einari hond, sum hava týtt úr grikskum. Men eisini hetta hevur Axel gjørt.

Hetta kom fyri á tann hátt, at lærararnir á studentaskúlanum høvdu fornaldarfrøði, ið er um ta fornu griksku mentanina. Tilfarið var danskar týðingar av grikskum tekstum. Teir hildu tað vera synd at teir sum føroyskir lærarar skuldu sita og lesa danskar tekstir við føroyskum næmingum, og heittu tí á Axel um at týða teir sjónleikir, sum lesast skuldu. Hann legði fyri við at týða sjónleikin Antigone eftir Sofokles. Týðingin fekk jaligar viðmerkingar frá næmingunum, og tá Norðurlandahúsið skuldi føra fram ein leik, varð henda týðing vald og fekk góða undirtøku á palli. Skjótt týddi hann so leikin Medeia eftir Euripides, sum fekk eins góða móttøku.

Fyri hesar týðingar fekk Axel heiðursløn M. A. Jacobsens í 1989.

Somuleiðis týddi hann leikin Agamemnon eftir Aiskylos, sum kom út í 1992.

Hann sigur hesa týðing vera ta torførastu, sum hann yvirhøvur hevur fingist við, men tað leggur lesarin ikki merki til.

Hesar týðingar úr grikskum fekk hann til at fara undir at týða tær sonevndu apokrýfisku bøkurnar til føroyskt. Hetta eru nakrar bøkur ið standa í tí bíbliu, sum varð nýtt í Føroyum í katólsku tíðini. Luther tók tær við í sína bíbliutýðing, og standa tær framvegis í gomlum bíblium, men eru síðani merkiliga forfjónaðar og hava ikki verið við í teimum føroysku bíbliunum.

Axel helt tað vera spell, at vit ikki skuldu kunna lesa hesar tekstir, sum forfedrar okkara fingu nógv burtur úr, á okkara egna máli. Hann fór tí í gongd, og eftir fýra mánum hevði hann fullført verkið, og kom bókin út í 1990. Í fyrstuni skeitti hann í aðrar týðingar, men hetta tók alt ov langa tíð, og týddi hann síðani beint úr grikskum. Týðingin er avbera løtt at lesa og tó væl í samsvari við upprunatekstin.

### Frá sponsku fluguni til Per Gúnt

Hóast Axel sat nógv við sítt skrivaraborð, livdi hann til fulnar við í bygdarlívinum. Eitt nú høvdu kvívíkingar altíð verið óførir at skipa fyri ymsum tiltøkum í bygdarhúsinum. Viðhvørt høvdu teir spælt sjónleik, og høvdu teir ein góðan pall. Teir heittu á Axel um at hjálpa sær, og hann týddi ein leik fyri og annan eftir.

Einaferð kom upp á tal at spæla ein leik sum æt Spanska flugan. Axel fekk bókina, gekk við henni í hondini runt í stovuni og dikteraði hvussu alt skuldi sigast á føroyskum. Tá fýra kvøld vóru farin á henda hátt var týðingin liðug. Undirtøkan var stór, fólk komu alla staðni frá at síggja, men tað endaði við, at kvívíkingar máttu fara aðrastaðni at spæla eisini. Tá liðugt var, høvdu umleið 13.000 fólk sæð leikin, og tað sigst vera føroyskt met.

Einasta av týðingum til kvívíkingarnar, sum er komin upp á prent, er Kerligheit men ongar hosur eftir Johan Hermann Wessel, sum kom út í 1991.

Tá Axel var farin um tey áttati, vildi Leikpallur Føroya føra fram sjónleikin Per Gúnt eftir Henrik Ibsen. Hetta er ikki hissini leikur at fara undir, og norðmenn plaga at siga, at eingin líkinda týðing er gjørd til nakað annað mál av honum. Men Axel týddi so hvørt venjingarnar fóru fram, og kom hann so væl frá hesum, at tey eru mong, sum halda tað vera spell, at henda týðing ikki enn er útkomin, men tað fer hon kanska at koma.

### V4 tættir

Tá útvarpið fór undir V4 sendingarnar gjørdu teir nógv burtur úr at framføra nýggjar tættir, sum serliga Hermann Jacobsen sang. Ofta kom tað fyri, at telefonin ringdi í prestagarðinum í Kvívík á middegi leygardag. Tá var tað útvarpið, sum var í telefonini, og neyðin var at teir máttu fáa ein tátt afturat til sendingina sama kvøld. Tað tók ikki langa tíð, so ringdi Axel suður aftur og las nýggja táttin upp fyri teimum. Hermann fekk hann og sang hann út til alt Føroya fólk áðrenn náttin var komin!

### Dagar og nøvn í álmanakkanum

Týðaraarbeiði hansara hevur mest sum alt snúð seg um fagrar bókmentir. Men hann hevur eisini skrivað eina rættiliga fakbók, og hon er Dagar og nøvn í álmanakkanum, sum kom í 1994. Hon byggir á tvær sendirøðir, sum hann hevði í útvarpinum um messur og søkur í árinum, har hann savnaði saman upplýsingar um fornar siðir í sambandi við teir gomlu katólsku halgidagarnar. Slíkar bøkur eru nógvar í øðrum londum, men sær er siður á okkara landi, sum ikki er aðrastaðni, og tað hevur Axel megnað at lýst so væl í hesi bók, at hon er at síggja víða hvar, og verður brúkt dúgliga av fjølmiðlunum, so hesi tíðindini um tað serliga føroyska í álmanakkanum koma rættiliga víða.

Nøkur ár eftir at Axel var farin frá sum prestur búði hann í Kvívík. Tá lestur skuldi lesast í kirkjuni spurdi deknurin viðhvørt, um hann hevði onkran lestur tøkan, og so skrivaði hann bara ein nýggjan at lesa!

Børnini og abbabørnini eru í Havn, og tí fingu Margreta og hann sær hús í Hornabø, har tey framvegis búgva.

### Tøkk

Eg skal ynskja Axeli tillukku við føðingardegnum og takka honum fyri alt tað sum hann hevur gjørt fyri tað føroyska málið í kirkju, í skúla, í útvarpi, á leikpalli og í bókum. Eg havi kent hann í meir enn eina hálva øld sum prest, sum lærara, sum útvarpsmann, sum lærarakollega og ikki minst sum rithøvund, har eg havi havt tann heiður at sloppið at geva út ein part av tí, sum hann hevur skrivað. Tað hevur verið ein frøi at kent hann, og skal eg nýta høvi til at takka honum fyri avbera gott samstarv.

**Zakarias Wang**



# Undangongumaðurin fyllir 75 ár

Runt um á Tvøroyri og har um leiðir er Merkið vundið á stong, og tað hevur sína heilt serstøku orsøk: Sverre Midjord fyllir 75 ár 2. apríl. Umframt, at mong á henda hátt vilja heiðra føðingardagsbarnið, hevur kommunan eisini móttøku fyri manninum, sum í mong ár stjórnaði býnum sum borgarstjóri, hevur umboðað oynna sum løgtingsmaður og annars í nógvar mátar hevur verið eitt stórt aktiv fyri staðið, ikki minst ítróttina í sínum breiðasta týdningi.

At nógv verður gjørt burturúr, er heldur ikki so løgið, tí talan er um ein merkismann, sum alt sítt lív á ósjálvsøknan hátt hevur virkað fyri, at nakað er hent, har hann hevur verið. Bæði í sínum politiska yrki og ikki minst innan ítróttina hevur Sverre verið drúgvur sum fáur, og tað er ikki ov nógv avgjørt at siga, at her er av sonnum talan um ein undangongumann av teimum stóru.

Áhugi hansara fyri samfelagsviðurskiftum og samfelagslívi sum heild eigur røtur í uppvøkstrinum, sum hann fekk í Valinum hjá ommu og abba sínum, Juliu og Poul í Trøðini. Valurin og alt umhvørvið har á leiðini gav honum íblástur og lærdóm, ið tú ikki fært á skúlabonki, men bert gjøgnum lívsins skúla. Og har má sigast, at Sverre veruliga hevur sogið og tikið til sín hugsjónir og virði, ið hava hildið til dagin í dag.

Umframt eitt sera virkið lív sum bæði lands- og kommunalpolitikari, hevur Sverre eisini verið sera virkin í ítróttini, og tað hevur altso verið í orðsins breiðasta týdningi. Hann hevur spælt bæði hondbólt og fótbólt, men fyrst og fremst hevur tað verið borðtennis, ið hevur staðið hansara hjarta nær. Har hevur hann vunnið í teggjuvís av meistaraheitum og heiðursmerkjum, og tað er ikki minst honum fyri at takka, at henda ítróttagrein hevur vunnið seg fram her á klettunum.

Fyrst og fremst er Sverre tvøramaður av heilum huga, og altíð hevur hann verið til reiðar at vart heimbýin, bæði í orði og verki. Hann hevur staðið á odda fyri Tvøroyrar Borðtennisfelag í fleiri umførum, og eisini var hann eitt skifti formaður í Tvøroyrar Bóltfelag. Í báðum støðum hevur hann ikki bert havt ein leiklut sum spælari, men minst líka nógv sum undangongumaður, og mong av okkara fremstu ítróttafólkum hava frá honum fingið gott í beinið sum venjari.

Men hóast tvøramaður og lokalur sum fáur, hevur Sverre tikið mangt takið fyri samlaðu ítróttina her á landi. Í samfull 42 ár tænti hann ítróttini við álitisstørvum í Ítróttasambandi Føroya, bæði sum starvsnevndar- og stjórnarlimur, umframt sum varaforseti í 25 ár. Fyri sítt trúgva og drúgva virki í hesum høpi er Sverre eisini heiðraður av ÍSF við bæði silvur- og gullnál, umframt gullmerki við bjálka. Eisini hevur hann fingið heiðurskross Ítróttasambandsins fyri stóra arbeiði sítt, føroysku ítróttafjøldini til gleði og gagns.

Nógv annað kundi verið nevnt í eini heilsan til føðingardagsbarnið í dag, tí talan er um sjáldsama virknan mann, ið ongantíð hevur verið bangin fyri at tikið tøk, har tað hevur verið neyðugt. Eisini, har vit onnur kanska ikki sóu tørv á tí, fyrr enn Sverre hevði víst á tað. Sum undangongumaður á so nógvum og ymsum økjum er tað nærum ófatiligt, at stundir hava verið til alt, men væl hevur ligið fyri hjá honum, so hann altíð finnur pláss fyri øllum tí nógva, ið stendur hjarta hansara so nær.

Hóast tríggir fjórðingar av eini øld nú eru lagdir aftur um bak, ber Sverre Midjord aldurin sum ein unglingi, bæði í sinni og skinni, og framvegis er hann gløggur og beinrakin sum fáur í bæði eygleiðingum og viðmerkingum. Við takksemi vilja vit í Ítróttasambandi Føroya heiðra henda merkismann á hansara runda degi og ynskja góðan byr og mong góð ár aftrat.

Hjartaliga tillukku!

**Ítróttasamband Føroya**
**Heðin Mortensen,**
**forseti**

Lesið Sosialin - so eru tit við